einfaldari
- ger tað einfaldari
September 2010

# Jóna send út sum trúboðari



Sunnudagin 15. august varð Jóna Gunnarsson send út sum trúboðari — Mynd: Tórvør Vang

Á møtinum sunnudagin 15. august varð Jóna Gunnarsson send út sum trúboðari í Chile.

Jóna hevur verið í tænastu hjá trúboðanarfelagsskapinum OM í Chile í eitt ár. Hon fór úr Føroyum 19. august í fjør. Saman við øðrum arbeiddi hon m.a. á barnaheimum, umframt at hon eisini fekk bíbliuundirvísing og undirvísing í mentan og sponskum.

Eftir at hava verið heima og hildið summarfrí fer hon nú aftur til Chile, har hon eftir ætlan verður í tvey ár. “Eg eri sera spent upp á at fara aftur til Chile, tí eg veit, at tað er har, Gud vil hava meg at vera,” sigur Jóna, sum upplivdi tann harða jarðskjálvtan í Chile tann 27. februar, sum kostaði umleið túsund mannalív umframt stórar oyðileggingar.

Nú Jóna fer aftur til Chile, skal hon saman við øðrum vera leiðari fyri arbeiði millum heimleys, umframt at tey eisini skulu vera leiðarar fyri arbeiði á einum barnaheimi.

Jóna hevur ymisk bønarevni sum t.d., at Gud gevur henni vísdóm til arbeiðið, at Gud leiðir røttu fólkini til arbeiðið, og at landið fær nøktandi hjálp eftir jarðskjálvtan. Teldupostadressan hjá Jónu er: jona_89@hotmail.com

lívdin
– í lívd hins hægsta
Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

## Stúrið ongum fyri

Paulus sigur við samkomuna í Filippi: “Stúrið ongum fyri, nei, latið í øllum tað, sum tit ynskja, koma fram fyri Gud í ákallan og bøn við tøkk!” (Fil. 4:6). Eitt nýtt samkomuár er byrjað, og vit gleða okkum til ein spennandi vetur. Ynski okkara er, at samkoman skal búnast andaliga, og at tað, sum fer at eyðkenna okkum í vetur, er opinleikin at leggja alt fyri Harran í bøn. Paulus vísir á lyftið við bønini: “So skal friður Guds, sum stígur upp um alt vit, varðveita hjørtu og hugsanir tykkara í Kristi Jesusi” (v. 7).



*Jógvan Zachariassen*

# Hendingar & tiltøk

### Poul Guttesen við nýggjari bók

Í síðstu viku var bókin Leaning into the Future eftir Poul F. Guttesen løgd fram í Veistluhøllini á Føroya læraraskúla. Hetta er Ph.D. ritgerðin hjá Poul.



*Poul F.Guttesen við nýggju bókini*

*Mynd: Einar Vang*

Í hesum sambandi vitjaði Ph.D. vegleiðarin hjá Poul, gudfrøðingurin Richard Bauckham, í Føroyum. Hann helt tveir fyrilestrar um, hvønn týdning skapanarverk Guds hevur í Bíbliuni og tí eisini eigur at hava í kristnu trúgv okkara. Richard talaði í Lívdini um, hvussu Gud opinberaði sín treytaleysa kærleika fyri menniskjum, tá Jesus rópti: “Gud mín, Gud mín, hví ert tú farin frá mær”.

Bókin hjá Poul snýr seg um týdningin av ríki Guds í trúgv okkara, hvussu vit eiga at liva í ljósinum av, at tann Gud, sum hevur opinberað seg í Jesusi, er Kongur og Harri okkara, og hvussu vit eiga at liva í vónini um, at tað er júst hesin Gud, sum ein dag fer at fullfíggja endamálið við skapningi sínum. Bókin kostar kr. 180,- og fæst í Logos bókasøluni. Eisini eru nøkur eintøk til keyps við kunningarborðið sunnumorgnar í Lívdini.



*Poul F.Guttesen og Richard Bauckham*

### Til lukku við barninum

7. august fingu Erla og Áki Mortensen í Hoyvík ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 5055 gr.



*Modelmynd*

### Til lukku við hjúnabandinum

Leygardagin 31. juli giftust Lindis í Gong og Jákup Danielsen. Vígslan var í Hebron á Argjum.



*Lindis og Jákup*

### Runnu niðan á Sornfelli

Leygardagin 28. august skipaði Mjørkadals Idrætsforening (MIF) fyri kapprenningini MIF TOP RUN 2010.

Kappingin gongur út upp á at renna teir 9,8 km frá Effo-støðini í Kollfjarðadali og upp á Sornfelli, sum er 680 metrar yvir havinum. Runnið varð eftir vegnum.

Millum teir 58 luttakararnar í kappingini vóru fleiri frá Lívdini. Fyrstur á mál var Sam Vang við tíðini 46 min. og 6 sek. Hetta er fimta árið á rað, at Sam hevur vunnið hesa kapping. Durita í Grótinum bleiv nummar eitt í sínum bólki, og Tórvør Vang bleiv nummar tvey í sínum bólki.

# MIF TOP RUN 2010

*Myndir: Einar Vang*








*Terje Hansen, Tórvør Vang og Árni Jakobsen* *Durita í Grótinum* *Sam Vang*





*Arnold H. Nielsen* *Jákup Alberg Berg* *Marjun Thomsen*

---

## Samkomubygningur við Marknagil

Samkoman Marknagil heldur nú til í egnum bygningi í Fjalsgøtu 2 í Havn.

Bygningurin er innrættaður til endamálið við samkomusali í niðaru hæddini og rúmum til aðrar aktivitetir í ovaru hæddini. Góð parkeringsviðurskifti eru á parkeringsøkinum hjá Føroya Handilsskúla.

Møtini eru soleiðis: Sunnudag kl. 10.30 er breyðbróting, kl. 12.00 er sunnudagsskúli og kl 18.00 er evangeliskt møti. Mánakvøld kl. 20.00 er bønarmøti.

Samkoman byrjaði sítt virksemi í vesturbýnum í oktober 2004 og hevur m.a. hildið til í kantinuni á Skúlaheiminum við Marknagil. Á heimasíðuni www.marknagil.fo stendur, at fyrimyndin hjá samkomuni er ein bíbilsk, nýtestamentlig og evangelisk samkoma.



*Samkoman Marknagil í Fjalsgøtu 2 í Havn*

## Skapa gleði í einum barnahjarta

Aftur í ár verða skógvaeskjur við gávulutum innsavnaðar í Føroyum og latnar treingjandi børnum úti í heimi. Øll kunnu gera mun hjá einum barni, sum annars ikki fær nakra jólagávu.

Tú kanst byrja at fylla í eina skógvaeskju nú, men síðsta innlatingarfreist er 31. oktober 2010. Fá fatur á eini skógvaeskju í góðari tíð. Støddin á eskjuni skal vera uml. 30 cm lang, 18 cm breið og 13 cm høg. Í eskjuna kanst tú koyra: leikur, skúlaútgerð, toilettgreiðir, góðgæti v.m.

Ikki koyra hetta í: mat, krígslutir, klæðir, flótandi, heilivág, veikar lutir, bøkur við teksti, politiskt ella átrúnaðarligt tilfar ella brúktar lutir.

Sí meira á www.livdin.fo



# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

**Sunnudagin 5. september**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Familjuløta: Kreativur bólkur*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: 2010 familjan - útlendingar giftir føroyingum*
*Talari: Ilda Lómstein*




**Sunnudagin 12. september**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Familjuløta*
*Talarar: Beinta og onnur*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Barnamøti*
*Talarar: Beinta og onnur*




**Sunnudagin 19. september**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Familjuløta: Kreativur bólkur*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Missión*
*Talari: Ian Burness*




**Sunnudagin 26. september**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Familjuløta: Kreativur bólkur*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Opið evni*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

**Umgdómstiltøk:**
Alive - leygarkvøld kl. 21.00

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*